UTTAN ÚR HEIMI

# Arafat – yvirgangsmaðurin sum gjørdist statsmaður

**Tað var Yasser Arafat, sum setti tað palestinska málið á heimskortið. Tað var hann, sum leiddi palestinarnar at gáttini til teirra egna ríki, men sum sveik í seinastu løtu**

ARAFAT DEYÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gjáramorgunin kunngjørdi hernaðarsjúkrahúsið í París, at palestinski leiðarin, Yasser Arafat, var deyður.

Hann var 75 ára gamal, og við deyða hansara er eitt tíðarskeið av. Hann kom upp á heimspolitiska pallin í 1969, tá hann gjørdist formaður í PLO. Hetta var, meðan Lyndon Johnson var forseti í USA og Vietnamkríggið stóð ovast á dagsskránni.

Arafat var frælsisstríðsmaðurin og yvirgangsmaðurin, hvørs politiska leið broytti hann til statsmann og fekk hann á listan yvir tey, sum hava fingið friðarheiðursløn Nobels. Hann megnaði at seta tað palestinska málið á dagsskránna hjá heimssamfelagnum, og við djørvum og nýhugsandi politiskum avgerðum mundi tað eydnast honum at útvega palestinum egið ríki. Men tá á stóð, kundi hann ikki góðtaka ta neyðugu neyðloysnina.

Nú hevur hann latið eitt útarmað og hersett fólk eftir seg. Eitt fólk, sum ikki hevur nakran leiðara, einki land, og sum er á eggini til eitt borgarakríggj.



*Arafat vísir sigurstekin, men hann rakk ongantíð tí endaliga sigrinum - einum sjálvsstøðugum palestinskum ríki*
*Mynd: Reuters*

## Fatah

Yasser Arafat var føddur í Kairo í august í 1929. Tað sigst, at ættarfólk hansara stava frá sjálvum Muhammed profeti. Foreldrini góvu honum navnið Muhammed Abdul Rauf Arafat al-Qudwa, men longu sum barn bleiv hann kallaður Yasser, sum merkir ein, ið ikki nýtist at stúra. Mamma hansara doyði, tá hann var trý ára gamal, og hann vaks tí upp hjá skyldfólki í Jerusalem og í Gaza.

Sum ungur fór Arafat til Kairo at nema sær útbúgving. Hetta var um tað mundið, tá palestinar vórðu riknir frá húsi og heimi, tí jødarnir skuldu hava egið ríki. Í 1948 bardist Arafat saman við Muslimska Bróðurskapinum í Gaza, og nakað seinni gjørdist hann formaður í palestinska studentafelagsskapinum. Í 1995 var hann liðugur at útbúgva seg til verkfrøðing og flutti til Kuwait. Har stovnaði hann saman við øðrum felagsskapin Fatah í 1959.

Í dag er Fatah tann størsti felagsskapurin í palestinska økinum og mergurin í palestinska frælsisfelagsskapinum PLO, sum bleiv stovnaður í 1964. Arafat eggjaði feløgum sínum til at gera álop á ísraelsk mál, og í januar í 1965 gjørdi Fatah fyri fyrstu ferð álop á mál inni í sjálvum Ísrael.

Tá Ísrael hersetti Vestara Áarbakka og Gaza-geiran undir Serksdagakrígnum í 1967, kunngjørdi Arafat, at kolvelting var tað einasta, sum kundi geva palestinska fólkinum sigurin. Um hetta mundið gingu palestinar í fleiri bólkum, men í 1969 eydnaðist tað Arafat at miðsavna mótstøðuna ímóti Ísrael. Samstundis bleiv palestinskt sjálvsstýrið stavnamálið.

## Tveittur á dyr

Í sjeytiárunum skipaði Fatah fyri fleiri yvirgangsatsóknum. Eitt nú var tað felagsskapurin hjá Arafat, sum beindi fyri jordanska forsætisráðharranum Wasfi al-Tall, og tað var eisini Fathah, sum skipaði fyri atsóknini at ísraelsku ítróttarfólkunum á olympisku leikunum í Múnchen.

Men Arafat hevði samstundis valt at halda eina diplomatiska kós fyri at lyfta tað palestinska málið upp á altjóða pallin. PLO fekk eygleiðarastøðu í ST, og í 1974 helt Arafat røðu á ST-aðalfundinum. Við hesum hevði hann gjørt tað palestinska málið til eitt altjóða mál.

Men Arafat var illa lýddur í tí arabiska heiminum, og hann hevði sitið í fongsli í fleiri londum. Myndugleikarnir í Sýrialandi vildu ikki tosa við hann, og Jordan gjørdi av at tveita hann og PLO á dyr. Egyptar vildu heldur ikki vita av honum, og tá Ísrael gjørdi innrás í Libanon í 1982, noyddist Arafat at flýggja. Hann fór nú til Tunis. Har royndi ísraelska fregnartænastan Mossad fleiri ferðir at beina fyri honum, men hvørja ferð miseydnaðist tað.

## Dugdi ikki

Mong hildu, at Arafat nú var settur til viks, men undir tí fyrsta palestinska uppreistrinum í áttatiárunum valdi Arafat at ganga ein nýggja leið, eina samráðingarlið fram ímóti einari varandi friðarloysn. Hetta endaði við teimum loyniligu samráðingunum í Oslo, og í 1993 kundi heimurin eygleiða Arafat og ísraelska forsætisráðharran Yitzak Rabin rætta hvør øðrum hondina á grasvøllinum uttan fyri Hvítu Húsini. Árið eftir fingu teir báðir og Shimon Perez friðarheiðursløn Nobels.

Men vónirnar um frið brustu, tá samráðingarnar í Camp David miseydnaðust, og palestinar fóru undir enn ein uppreistur við sjálvmorðsbumbuálopum og ísraelskum hevndarálopum.

Í 1994 kom Arafat til Gaza-geiran og valdi at fáa sær høvuðsstøð í Ramallah á Vestara Áarbakka stutt norðan fyri Jerusalem. Men hann skilti ikki, at tað krevur annað handalag at byggja land enn at halda skil á einari mótstøðurørslu. Hann dugdi ikki at lata øðrum vald og ábyrgd, men valdi sær embætismenn, sum gjørdu, sum hann segði.

Ferð eftir ferð setti hann seg upp ímóti altjóða krøvum um nýskipanir í palestinsku økjunum, og harðskapurin og upgerðir ímillum vápnaðar bólkar í Gaza og pørtum av Vestara Áarbakka eru tekin um eitt samfelag, sum onga leiðslu hevði, júst tí Arafat tvíhelt um, at hann einsamallur skuldi hava leiðsluna.

*(Kelda: Berlingske Tidende)*



# Hví fara út, tá ið tú júst er komin inn



GRÍMUR OG GRANAR
*Ummælt hevur Oddfríður Marni Rasmussen*



Nú áttaoghálvfjersinstjúgundi leikurin hjá Grímu er spældur, og gríman er vaskað av, bíða vit í spenningi eftir hvussu leikur fer, nú Tjóðpallur Føroya skal takast í nýtslu 1. Januar 2005. Hyggja vit inn undir grímuna, so hevur hon verið málað við øllum andlitsbrøgdum, sum hugsast kunnu. Hon hevur fingið granarnar á Tingsins røðarapalli at vamlast, aðrar at gníggja saman hendur, meðan onnur hava staðið við síðuna av og eygleitt baksláttrarnar, sum eru komnir av nærum hvørjum leiki, sum higartil hava verið framførdir av leikarunum í Grímu. Ein sannroynd er, at leikirnir, sum Gríma hevur framført, hava tváa nógv andlit so væl, at veruligu grómurnar eru komnar undan.

## Seinasti leikurin

Seinasti leikurin, sum Gríma spælir eitur Elling og Kjell Bjarni, og skrivað til leik hevur Axel Hellestenius í samstarv við Petter Næss. Leikurin er bygdur á skaldsøguna hjá Ingvar Ambjørnsen. Súmbolskt er, at hann skal eita "Elling." Kanska er hetta ein misháttur dunnuungi, sum við Tjóðpalli Føroya verður til ein svana ella … ja, tað er upp til somu politikarar, sum Gríma hevur fingið at víst okkum sítt veruliga andlit.

Elling og Kjell Bjarni eru minnimentir, simplir, dólgar, tápugæs, tjórneyt …, ja vit hava nógv orð fyri hetta slagið av menniskjum, sum í nógv ár við skomm, hava útflutt til Danmarkar.

Nú er støðan hjá teimum, sum hava sinnisligar trupulleikar at dragast við tann, tey ikki hava møguleikan at seta føtur undir egið borð. Elling og Kjell Bjarni eru kominr í ta hepnu støðu, at teir hava fingið boðið at seta føtur undir egið borð. Treytir fylgja við, sjálvandi. Fyrst skulu teir skikka sær væl, og gera sum Gunn, pleygarin sigur, at teir skulu gera. Teir báðir Elling og Kjell Bjarni fáa íbúðina, men undir uppsýni av Janu frá Almannastovuni. Einaferð um mánaðin kemur hon inn á gólvið at hyggja, hvussu teir hava tað, og at geva teimum ráð um, hvussu teir skulu geberda sær úti í samfelagnum.

Í íbúðini beint oman fyri teir, býr Randi Nordahl. Hon er upp á vegin. Kjell Bjarni, sum ongantíð hevur fingið eitt lítið, verður beinanvegin forliptur í henni, tá ið teir eitt kvøldi finna hana avdotnað á trappuni. Sum tíðin gongur, venja teir seg smátt um smátt við mótgangin og alt tað nýggja í samfelagnum og ókenda veruleikan, ið fylgir við tí. Eg fari ikki at siga, hvussu alt endar. Tit kunnu hyggja sjálvi.

## Tað er normalt at vera sinnissjúkur

Leikurin Elling og Kjell Bjarni dregur fram nógv evni, sum vit til dagliga ikki vilja draga fram í ljósið. Hetta er annar leikurin, Gríma spælir, sum fæst við tey menniskjuni, sum ikki eru sum onnur - hvat tað so vil siga. Hin var "Eitur nakað land Week-end." Sjálvur haldi eg, at tann leikurin passaði betri til Føroyar og føroyingar, tí hann er skrivaður av føroyingi til føroysk viðurskifti, men Elling og Kjell Bjarni stríðast við sovorðnar alheimskendar kvalir, at hann so sanniliga eisini nemur føroysk viðurskifti.

Hvør er normalur? Og, hvør er ikki normalur? Hesir spurningar verða reistir við jøvnum millumbilum. Øll hava sína meining um tey sokallaðu ónormalu, og tað havi eg eisini. Eg meini, at ein sinnissjúkur persónur hevur avmarkaðar møguleikar at dumma seg. Har aftur ímóti, hevur ein persónur, sum ikki er sinnissjúkur størri møguleikar at gera okkurt ónormalt, tí hann er ikki undir eftirliti alla tíðina. Tað kemur eisini fram í leikinum, hvør dummar seg mest, hvør hevur menniskjaligari feilir, tann sokallaði normali ella tann ónormali.

Øll hava sínar trupulleikar at dragast við. Maðurin hjá Janu frá Almannastovuni er farin til Grikkalands og er lógliga leingi burturstaddur. Randi Nordahl, er upp á vegin og manglar kærleika frá onkrum, og hon finnur okkurt slag av kærleika hjá Kjell Bjarna.

Báðir hava teir havt eitt heldur løgið samband við mammu sína. Kjell Bjarni var vanur at taka sær av sínari avdotnu mammu og fáa hana spýggjureina og til songar. Mamma Elling stýrdi við harðari hond. Elling slapp bert at taka sær av tí ideologiska, meðan mamman tók sær av øllum tí verkliga. Helst hevur hetta ikki verið nóg mikið til, at Elling er endaður á einari lukkaðari deild. Okkurt annað, sum vit bert kunnu hugsa okkum til, býr undir hansara sinnisliga veikleika.

## Leikararnir

Leikararnir spæla framúrskarandi væl. Serliga legði eg merki til góðu teimingina millum Bárð og Hans. Bárður var so sannførandi í sínum leikluti sum Kjell Bjarni, at viðhvørt rann mær kalt niður eftir bakinum. Hans er altíð sannførandi í sínum leiklutum. Í leiklutinum sum Elling, legði eg mest til kropsmál hansara. Hans hevur eitt kropsmál sum fáur. Katarina, sum Jana frá Almannastovuni, Kristina sum Randi Nordahl og Ria Tórgarð sum Gunn, pleygarin og servitrissa spældu allar væl upp móti báðum høvuðsleikurunum. So ikki kann sigast annað enn, at "The grand old man" innan føroyska leikstjórn, Eyðun Johannesen, hevur aftur sett upp ein megnarleik.

## Pallurin

Pallurin er sera sniðfundigur. Hann horvir undan beint móti áskoðarunum. Hetta er við til, at áskoðarin sær alt sum ein mótburð, og eisini er pallurin eitt súmbol uppá tann skeivleika, sum teir báðir Elling og Kjell Bjarni føla við teirra nýggja heimi. Tað tykist strevi hjá teimum at koma fram til allar dyrnar í rúminum uttan úthurðina. Úthurðin er einasta hurðin, sum Elling hevur ilt við at lata upp. Hann skilir ikki, at tú skal fara út, tá ið tú júst er komin inn. Leikurin er pakkaður við slíkum umberingum, sum vit dagliga ikki hugsa um.

## Týðingin

Týðingin hjá Hans Tórgarð er ræðulig. Hon er full av danismum, sum fyri langara tíð síðani eru horvnar úr føroyskum. Men, um vit hugsa um øll tey sinnissjúku, sum vórðu flutt av landinum sum ung, og sum eru komin heim aftur í dag, so snakka tey soleiðis. Eitt sinnissjúkt mál. Og øll tey, sum hava verið í Danmark og nomið sær útbúgving. Kanska er málið eins heimleyst sum teir báðir Elling og Kjell Bjarni. Tey hava ikki havt eitt føroyskt fakmál sum so. Hetta er einasta niðurstøðan, eg kann koma fram til, tí eg veit, at Hans dugir nógvar ferðir betri enna hatta, og at týðingin er tilvitað.

## Tjóðpallur Føroya

Eg vóni so sanniliga, at føroyskir politikarar við virðing fyri føroyskari mentan, eru fúsir at bera so í bandi, at eitt gott leikhús kann knýtast at Tjóðpalli Føroya. Tí hvat er ein pallur uttan okkurt at heingja tjaldið á.